SKÚLAFÓTBÓLTUR

Góðu næmingar og foreldur,

nú nærkast dagurin, har vit fara til Vágs, í Marghøllina at kappast í 1. umfarinum í Skúlafótbólti, sum verður fyri 6. flokkar mikudagin 24. oktober.

Tað eru tilmeldaði 29 lið í 6. flokki. Tilsamans eru tað umleið 265 næmingar. Á heimasíðuni www.skulafotboltur.fo, undir "Kappingar & úrslit" og 6. flokkur (beinleiðis leinkja er her: http://skulafotboltur.fo/kappingar-urslit/6-flokkur/) síggja tit, hvørji lið eru tilmeldaði.

SvL hevur meldað 3 lið úr 6. flokki til kappingina. 2 dreingjalið og 1 gentulið.

Ferðaætlanin:

Næmingarnir møta í seinasta lagi kl. 8:15 uttanfyri Farstøðina. Vit eru á Krambatanga á Tvøroyri kl. 10.30. Bussar við átekningini "Skúlafótbóltur" bíða á keiini eftir okkum. Hesir bussar koyra beinleiðis til Marghøllina – og eru vit í Marghøllini umleið kl. 11.00. Bussarnir koyra eisini úr Marghøllini kl. 17.30 og á Krambatanga. Smyril er aftur í Havn kl. 20:30.

Kostur:

"Uden mad og drikke, duer helten ikke!" er eitt gamalt orðatak. Av tí at dagurin verður heldur drúgvur, hevur skúlin bílagt døgurða til næmingarnar í Vági. Tó vilja vit mæla til, at øll hava etið nógvan morgunmat og hartil taka ein stóran matpakka við (t.d. breyð + frukt). Minnist eisini til at hava drekkidunk við. Lummapeningur er loyvdur, tó í mesta lagi kr. 100,-.

Minnist til:

Minnist til ítróttarklæði, drekkidunk, fótbóltsskógvar og skinnarar (hetta er eitt krav!). Minnist eisini til at taka svimjiklæðir við, tí møguleiki verður at fara at svimja í Páls Høll (ókeypis fyri luttakandi liðini), áðrenn vit fara heimaftur. Vit fara at brúka tær vøkru gulu SvL-troyggjurnar, ið 6. flokkur var ílatin á felagsskúlamyndini í juni mánaði í ár. Vinarliga takið tær við suður.

Eru ivamál ella spurningar, so kunnu tit altíð senda ferðaleiðaranum ein teldupost (roi.jacobsen@skulin.fo) ella ringja (til Róa Jacobsen 280313).

Blíðar heilsanir

Skúlin við Løgmannabreyt